# ítróttur

Nr. 173 • leygardagur • 8. september 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

B36-B68:

## Toftamenn skulu hjálpa GÍ

**Fyri toftamenn er tað ein stórur fyrimunur, um tað verður GÍ heldur enn B36, sum gerst føroyameistari**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

At B68 fekk eina út av lagi vángaliga kappingarbyrjan, er sum so einki dulsmál. Síðani komið var í helvt við fyrru kappingarhálvu, hevur tó gingið framá hjá toftamonnum, og hóast teir neyvan kunnu gera sær vónir um gullmerkini, so tykist bronsan at gerast ein alt størri veruleiki.

### Spæla fyri UEFA

Aloftast hevur hendan givið atgongd til UEFA cup kappingina, men í fjør rakk hetta bert til Inter-Toto hjá toftamonnum, og vandi er fyri, at tað eisini verður soleiðis í ár. Verður B36 føroyameistari, fær KÍ nevnliga UEFA cup plássið fyri steypakappingina, meðan GÍ fær seinna atgongumerkið. Tí er tað ein risastórur fyrimunur hjá B68, um tað verður GÍ, og hetta er kanska størsti motivatiónsfaktorurin hjá B68, tá teir fara í Gundadal sunnudagin.

Til dystin hava toftamenn tað mesta av fólkinum tókt, tó at onkur einstøk ivamál eru.

Heilt víst er í øllum førum, at Jan Dam ikki verður við. Fyrverandi landsliðsmaðurin er leikbannaður. Hinvegin er ivasamt við bæði Jan Petersen og Marcello Marcelonho. Jan hevur leingi drigist við skaða, og hóast hann ikki hevur vant nógv seinastu tíðina, so vóna teir, at tað fer at bera til hjá honum. Marcello fekk ein snudd undir venjingini hóskvøldið, og tá vit seinast frættu, var ivasamt, hvussu álvarsligur hesin var.

### Uttan John

Hjá B36 er einki at ivast í, hvørjum leikara størsti saknurin verður í. John Petersen fekk reytt kort, tá B36 var í Miðvági, og fær tískil ikki spælt við hesa ferð. Tað fær Niels Joensen helst heldur ikki. Ungi miðvallarin kom inn og setti veruliga ferð á móti FS Vágum, men hann hevur meitt sær okkurt liðband í knænum, og fær tískil ikki verið við.

Hinvegin telur tað helst nógv rætta vegin, at fleiri aðrir leikarar aftur eru tøkir. Týdningarmestir eru ivaleyst Jákup á Borg og Pól Thorsteinsson, sum báðir vóru burtur frá seinast, og har umframt hevur Jacobsen aftur vant við fullari ferð, eftir at hann hevur verið skaddur í nakrar vikur.

Hjá B36 ræður sjálvandi eisini um at vinna. Í løtuni sigur formkurvan 10 sigrar á rað, og umframt at miðja eftir gullmerkjunum, ætla teir í yngra høvuðsstaðarfelagnum helst eisini at taka metið, sum grannarnir eiga. Fyrst í sjeyti árunum vann HB 12 dystir á rað í einum og sama kappingarári.



*Jákup á Borg hevði leikbann móti FS Vágum, og ivaleyst eru tey í B36 fegin um, at hann nú aftur fær verið við*

## Karmarnir skulu gerast lidnir

**Skjótt fráfarandi formaðurin í FSF, Torleif Sigurðsson, heldur, at umstøðurnar kring Tórsvøll mugu fáast í rættlag, áðrenn farið verður í holt við komandi undankapping**

TÓRSVØLLUR
*Jákup Mørk*

Sum nevnt í fjølmiðlunum í hesi vikuni, so ætlar FSF formaðurin seinastu 20 árini, Torleif Sigurðsson, at leggja frá sær, í seinasta lagi á aðalfundinum komandi ár.

### Fáa Tórsvøll góðkendan

Hetta merkir tó ikki, at Torleif ongar ætlanir hevur fyri tað tíðarskeiðið, sum hann enn hevur eftir at virka, og eitt hitt mest átrokandi tykist vera at fáa viðurskiftini kring Tórsvøll í rættlag, soleiðis at hann eisini framyvir kann nýtast í altjóða høpi.

Støðan í dag er nevnliga tann, at loyvi frá UEFA at nýta Tórsvøll til altjóða dystir bert er eitt fyribils loyvi. Hetta varð givið í 1999, og sambært Torleifi er so spurningurin, hvussu leingi hetta kann standa við.

- Tað eru ymisk viðurskifti – serliga viðvíkjandi fasilitetum til spælarar og dómarar – sum skulu fáast í rættlag, og vit kunnu ikki bert ignorera hetta. Í øllum førum fellur hamarin fyrr ella seinni, og tí er umráðani at fáa hetta í rættlag sum skjótast, sigur Torleif.

- Verandi hølisumstøður eru ikki nøktandi, og eitt nú mugu okkara menn skifta í HB-húsinum, meðan gestirnir eru í B36 húsinum. Tað øvugta kundi slettis ikki komið upp á tal, tí tá verður frástøðan til vøllin ov stór, og hetta er ikki nøktandi fyri trygdina.

### Til komandi heyst

Spurdur, um hann hevur nakra hóming um, nær hetta arbeiði kann gerast liðugt, sigur Torleif, at tað hevur hann sum so ikki.

- Á seinasta aðalfundi fekk FSF loyvi til at inniloka bygningin, og seinasta hondin verður nú løgd á hetta arbeiðið. Eftir hetta mugu vit so stinga út í kortið, hvat næsta stigið verður, og vónandi kann ein fullfíggjað ætlan so verða klár til komandi aðalfund.

- Mín vón er so í øllum førum, at vit tá fara at gera niðastu hæddina í bygninginum klára, soleiðis at rúm til dómarar og spælarar kunnulera tøk. Akkurát nær, hetta kann verða liðugt, er ikki so lætt at siga, men eg haldi, at vit eiga at satsa uppá, at hetta er gjørt, tá farið verður undir heimadystirnar í komandi undankapping. Tað vil siga til heystið komandi ár, sigur Torleif Sigurðsson at enda.



*Formaðurin í FSFvil fegin hava karmarnar kring Tórsvøll í rættlag, soleiðis at alt er klárt til komandi heyst*



B71-HB:

## Kreppufótbóltur á Sandi

*Hjá Halli Danielsen og liðfeløgunum í HB kemur tað ivaleyst illa við, at heili tríggir leikarar í løtuni eru leikbannaðir*



**Hjá báðum liðunum ræður um at venda skeivu gongdini, sum hevur staðið við at kalla alt kappingarárið**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Í kreppuárunum her heima var Sandoyggin eitt av útjaðaraøkjunum, sum var harðast rakt. Í ár hevur kreppan so aftur rakt oynna, men hesa ferð er tað so í ítróttahøpi, at so er.

Síðani summarsteðgin hava sandoyingar enn ikki fingið eittans stig, og nú er av álvara farið at sansa at í botninum.

Av teimum fýra dystunum, sum eru eftir á skránni, er talan bert í einum føri um heimadyst, so ivaleyst leggja sandoyingar nógv fyri í royndunum at vinna móti HB sunnudagin.

Sandoyingar hava eisini mest sum alt fólkið tókt, og ivaleyst vóna teir eisini, at heilt fitt av byrgafólkinum verður at stuðla, tá hetta takið skal takast.

Vanliga vildi tað kanska verið soleiðis, at uppgávan móti HB tóktist sum verandi heldur møtumikil, men hetta árið hava havnarmenninir so avgjørt verið til at tosa við, og sæð burtur frá teimum seks stigunum móti EB/Streymi, er einsamalla stigið í Havnini einasta stigið, sum B71 hevur vunnið higar til í ár.

### Mannfall í HB

Tosa tey um kreppu á Sandi, so er er støðan ikki heilt ólík í Havnini. Í sigursvanda HB gongur krepputosið av álvara í hesum tíðum, og sum støðan er nú, stevnir besta mansliðið móti vánaligastu plasering síni yvirhøvur.

Tí hava HB-leikararnir eisini nakað at stríðast fyri sunnudagin, men teir mugu so klára seg uttan fleiri av teimum, sum vanliga teljast millum føstu stuðlarnar á liðnum.

Jóhannis Joensen fekk sum kunnugt reytt kort í uppgerðini móti NSÍ, og í øllum førum hevur hann nú leikbann í tveir dystir. Harafturat hava bæði Allan Mørkøre og Janus M. Joensen ov nógv gul kort á kontini, og tí noyðist Ion Geolgau helst at finna sær nøkur heilt nýggj kort til kabalina sunnudagin. At so málverjin, Bárður Johannesen, aftur er skaddur, eins og Vagnur M. Mortensen enn ikki er klárur at spæla er í so máta bert steinur oman á byrðu hjá HB liðnum, sum í ár hevur verið óvanliga hart rakt av skaðum og aðrari fráveru.

NSÍ-VB:

## Vágbingar krevja stig

**Meðan runavíkingar lítið annað enn æruna hava at spæla fyri, hava vágbingar framvegis eina vón um bronsumerkini**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

*Tað hevur gingið hampuliga væl hjá NSÍ seinastu tíðina, men VB hevur tørv á trimum stigum, um heiðursmerkjavónin skal varveitast*



Runavíkingar hava lítið annað enn æruni at spæla fyri, tá teir sunnudagin taka ímóti VB. Hinvegin hevur tað áður víst seg, at júst í hesari støðu eru runavíkingar vandamiklastir, og millum annað mundu teir oyðilagt bronsuvónirnar hjá KÍ, tá liðini dystaðust.

### Kári undir knívin

Tí er tað helst eisini við góðum vónum, at teir fara í holt við dystin móti VB, og tað er helst eisini ein eyka motivatiónsfaktor, at talan er um verandi meistararnar.

Rúnavíkingar hava so at siga alt fólkið tókt, sum fyri hálvari aðru viku síðani var við at fáa málleysan javnleik í Havnini. Einasta undantak er Kári Hansen, sum hevur ein skaða í knænum, og í løtuni bíðar eftir eftir at verða skurðviðgjørdur. Áki L. Hansen hevur ofta verið á beinkinum, og kom eisini á vøllin móti HB, men hann hevur eisini onkran skaða at dragast við.

Dánjal Hansen, sum hevur verið lítið at sæð á besta liðnum seinastu dystirnar, hevur tvey vikuskifti upp í slag spælt við aðru deild, og møguliga er hann nú somikið væl fyri, at talan aftur verður um fótbólt í fremstu røð.

### Uttan Zivkovic

Vágbingar, ið sum nevnt framvegis kunnu rópa seg føroyameistarar, hava við einari einstakari broyting sama fólkið, sum megnaði at vinna sær eitt stig í Gøtu. Hesa ferð er eitt stig tó helst ikki nóg mikið hjá VB, tí skulu teir gera sær nakrar vónir um heiðursmerki, er helst neyðugt við fullari úrtøku komandi dystirnar, meðan teir so mugu vóna, at B68 snávar onkra staðni á vegnum. Har afturat kann fjórða plássið geva Inter-Toto bólt, so vágbingar hava alla orsøk at stríðast.

Einasta fráveran er Predrag Zivkovic, sum hevur leikbann, meðan fleiri av hinum leikarunum, sum annars hava drigist við smáskaðar, nú hava havt tvær vikur at koma fyri seg, og tí allir eru til reiðar at tørna út aftur.

## Dystirnir hetta vikuskiftið

### 1. deild

| | | |
|---|---|---|
| 09.09 | FS Vágar-GÍ | Eiler Rasmussen |
| 09.09 | EB Streymur-KÍ | Petur Hansen |
| 09.09 | B71-HB | Petur E. Kjærbo |
| 09.09 | NSÍ-VB | Suni Johansen |
| 09.09 | B36-B68 | Oddmar Andreasen |

### 2. deild

| | | |
|---|---|---|
| 08.09 | Skála-Sumba | Jón Kári Frederiksen |
| 08.09 | NSÍ-B36 | Tummas P. Olsen |
| 08.09 | HB-TB | Dia Lamhauge |
| 08.09 | LÍF-KÍ | Regin Egholm |
| 08.09 | ÍF-GÍ | Dagfinn Olsen |

### 3. deild

| | | |
|---|---|---|
| 09.09 | ÍF-GÍ | Edvard Højgaard |
| 09.09 | TB-KÍ | Eyðun Kjærbo |
| 09.09 | B71-AB | Georg N. Rasmussen |
| 09.09 | Royn-VB | Zoran Mancic |
| 09.09 | B36-B68 | Eigil Olsen |

## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 14 | 12- 1 - 1 | 50 | 12 | 38 | 37 |
| 2 | GÍ | 13 | 10- 2 - 1 | 39 | 14 | 25 | 32 |
| 3 | B68 | 14 | 8 - 2 - 4 | 30 | 19 | 11 | 26 |
| 4 | KÍ | 14 | 7 - 0 - 7 | 20 | 30 | -10 | 21 |
| 5 | VB | 14 | 6 - 2 - 6 | 31 | 20 | 11 | 20 |
| 6 | NSÍ | 14 | 5 - 3 - 6 | 17 | 19 | -2 | 18 |
| 7 | HB | 13 | 5 - 2 - 6 | 22 | 17 | 5 | 17 |
| 8 | EB/ Streymur | 14 | 4 - 1 - 9 | 15 | 26 | -11 | 13 |
| 9 | FS Vágar | 14 | 3 - 0 -11 | 15 | 57 | -42 | 9 |
| 10 | B71 | 14 | 2 - 1 -11 | 11 | 36 | -25 | 7 |

## Støðan, 2. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Skála | 15 | 7 - 6 - 2 | 27 | 15 | 12 | 27 |
| 2 | ÍF | 15 | 8 - 2 - 5 | 47 | 27 | 20 | 26 |
| 3 | B36 | 15 | 8 - 2 - 5 | 35 | 33 | 2 | 26 |
| 4 | TB | 15 | 7 - 4 - 4 | 37 | 31 | 6 | 25 |
| 5 | HB | 15 | 6 - 3 - 6 | 30 | 28 | 2 | 21 |
| 6 | Sumba | 15 | 5 - 4 - 6 | 33 | 32 | 1 | 19 |
| 7 | NSÍ | 15 | 6 - 1 - 8 | 27 | 36 | -9 | 19 |
| 8 | LÍF | 15 | 4 - 4 - 7 | 29 | 34 | -5 | 16 |
| 9 | KÍ | 15 | 4 - 4 - 7 | 24 | 32 | -8 | 16 |
| 10 | GÍ | 15 | 3 - 4 - 8 | 19 | 40 | -21 | 13 |

## Tølini tala

*Á talvuni høgrumegin sæst, hvussu tað hevur tørna út, tá mótstøðuliðini á vøllinum sunnudagin hava hitst seinastu tíggju árini*

| | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | '91 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| FSV-GÍ | 2-0 | - | - | 0-4 | 1-3 | 3-2 | - | - | 0-1 | 1-2 | 2-0-4 | 7-12 |
| EB/S-KÍ | - | - | - | - | - | - | 2-2 | - | - | - | 0-1-0 | 2-2 |
| B71-HB | 0-1 | 2-2 | - | 0-9 | 0-2 | 2-0 | 1-2 | 2-1 | 0-0 | - | 2-2-4 | 7-17 |
| NSÍ-VB | 4-0 | 1-0 | 4-1 | 1-4 | - | 0-3 | - | - | 0-1 | 0-3 | 3-0-4 | 10-12 |
| B36-B68 | 1-2 | 4-0 | 2-1 | 2-1 | 4-3 | 0-4 | 2-3 | 0-0 | 0-0 | 3-0 | 5-2-3 | 18-14 |